Upplýsingarherferð hjá Heilbrigdinum:

Lýsing fyri túsundtals krónur í Dimmalætting

Almenni viðgerðarstovnurin á Velbastað hevur eina upphædd á fíggjarætlanini, sum er ætlað til upplýsing og fyribyrgjandi tiltøk. Heilbrigdið nýtir upphæddina til heilsíðulýsing í Dimmalætting, sum kostar 10.000 krónur

Vøkur og glæsilig er heilsíðulýsingin hjá Heilbrigdið í Dimmalætting.

Í fyrstuni heldur tú at hon er handilslýsing fyri okkurt gistingarhús. Tað næsta tú hugsar er, at Heilbrigdið vantar viðskiftafólk ella sjúklingar, sum teir nevna tað, tá fólk hava rúsdrekkatrupulleikar og hava brúk fyri hjálp.

Ingi Mohr, leiðari á Heilbrigdinum, sigur við Sosialin, at teir hava nóg mikið at gera, og als ikki hava tørv á at fáa fleiri fólk í viðgerð á Velbastað. Tað er ikki orsøkin til, at stovnurin hevur sett heilsíðulýsing í blaðið.

Peningurin av upplýsingarkontoini

- Vit hava ávisa upphædd til fyribyrgjandi og upplýsandi arbeiði, og tað er henda upphædd, sum vit hava valt at brúka, við at seta lýsing í Dimmalætting, sigur Ingi Mohr.

- Fólk venda sær ofta til okkara, fyri at fáa upplýsing um viðgerð o.a. í samband við rúsdrekkatrupulleikar. Vit hava gjørt ein faldara, sum ætlanin varð at senda í hvørt hús í Føroyum, so sum Blákrossheimið eisini hevur gjørt, men vit hildu hetta vera lættasta loysnin, sigur Ingi Mohr.

Heilbrigdið er á fíggjarlógini við 4,7 mió. krónum í 1994, og stovnurin heldur seg innan fyri fíggjarliga karmin, sigur Ingi Mohr.

- Vit royna at brúka peningin til tað, sum upphæddin er ætlað til, t.v.s., at heilsíðulýsingin í Dimmu er tíkin av kontoini til upplýsing og fyribyrging.

Kann verða spard burtur

- Tá Heilbrigdið ikki hevur brúk fyri at fáa fleiri fólk í viðgerð, kundu tit so ikki nýtt peningin til annað endamál?

- Nú er tað soleiðis, at játtanin til Heilbrigdið er skorin nógv niður seinastu árini. Brúka vit ikki peningin, sum er tøkur til ávísu endamálini, so verður eisini tann upphæddin spard burtur, sigur Ingi Mohr.

Trý fólk stóðu á bíðilista at sleppa í viðgerð á Heilbrigdinum mikudagin.

Dagny

Lýsingin hjá Heilbrigdinum í Dimmalætting er ein royndar at upplýsa um og fyribyrgja rúsevnismisnýtslu. Heilbrigdið hevur játtan á fíggjarlógini, sum er 4,7 mió. krónur í 1994. Lýsingin í Dimmalætting kostar 10.000 krónur, og upphæddin er tikin av kontoini til upplýsandi og fyribyrgjandi tiltøk, sigur Ingi Mohr, leiðari á Heilbrigdinum

Heilbrigdið
- varandi loysnin á alkoholtrupulleikunum
Hevur tú alkoholtrupulleikar, so ring til okkara á tlf. 28055 ella tlf. 18160 - ella stokk inn á gólvið á viðgerðarheiminum á Velbastað ella Yviri við Strond. Vit eru altíð til reiðar at hjálpa tær og vegleiða teg.
Hvat er Heilbrigdið
Minnesotafyrimyndin
Gott umhvørvi
Viðgerðin gevur úrslit
Familjurádgeving
Alkoholisma
Alkoholisma hevur limm serkildar eginleikar. Teir eru:
Velbastaðvur, tlf. 28055 • Yviri við Strond, tlf. 18160
Viðgerðarheimið eftir Minnesota fyrimyndini

Óli Jacobsen, landsstýrismaður:

Arbeiði er eisini annað enn fiskur

- Handilsavtalan við ES er fríhanidlsavtala, og tað inniber, at vit kunnu útflyta allar vørur, undantikið fiskavørur tollfrítt til ES lond, sigur Óli Jacobsen

Í Landsstýrinum hava tey ikki gloymt arbeiðsloysið.

Har verður arbeitt við fullari megi at gera lógararbeiðið, sum skal til fyri at fáa fleiri arbeiðsplkáss á landi og á sjógvi.

Herfyri legði Óli Jacobsen fram uppskot um, hvat er neyðugt at gera fyri at fáa fleiri fólk í arbeiði. Ein nevnd er sett, sum skal gera lógararbeiðið, og hon skal verða liðug í seinasta lagi 14. november.

Uppskotið skal síðani fyri á landsstýrisfundi, og um tað verður góðtikið, lagt fyri tingið til viðgerðar.

Næsta ár kemur vend í

1. januar skal tað vera møguligt at fara undir at stovna nýggj arbeiðsplkáss, eftir hesum uppskotinum, sigur Óli Jacpbsen.

- Útlitini eru góð, men tað er ógjørligt at nevna tøl í hesum sambandi. Tað, sum umræður, er at fáa virksemið aftur í samfelagið, og at fáa vinnulívfólk at trúgva uppá, at tað kann lata seg gera, sigur Óli Jacobsen.

Hann heldur, at upp til fleiri arbeiðsætlanir kunnu geva nógv arbeiðsplkáss, men Óli Jacobsen vil ikki selja skinnið fyrr enn bjørnin er skotin, sum hann tekur til.

- Nýggir møguleikar eru eisini komnir í ljósmála, sum eg ikki kann siga meir um nú, men um einar tríggjar vikur verður nýtt at frætta um tað, sigur Óli Jacobsen.

Hann vil ikki siga, hvørjar ætlanir talan er um, men sigur kortini, at elektroniska virkið í Vágum, sum fekk so syrgiliga lagnu, ikki skal endurtaka seg, um ein slík fyritøka vil stovna virki í Føroyum.

Útflyta tollfrítt til ES

- ES-avtalan er ein fríhandilsavtala, og hon inniber, at vit kunnu úflyta allar vørur tollfrítt, undantikið fiskavørur.

- Her er ein veruligur møguleiki at finna fram til, hvørjar aðrar vørur enn fiskavørur vit kunnu gera í Føroyum, og her er elektroniski ídnaðurin avgjørt ein møguleiki.

- Fáa vit møguleika at stovna slík virkir, so skal hann loftast, sigur Óli Jacobsen.

- Vit kunnu fáa fleiri arbeiðsplkáss, bæði á sjógvi og landi, men vit kunnu eisini royna allar aðrar møguleikar, sum ikki hava við fisk at gera, sigur Óli Jacobsen.

Dagny

Óli Jacobsen, landsstýrismaður í ídnaðar- og arbeiðsmarknaðarmálum

Broytingar í ALS:

Tryggjar fyribils øll arbeiðsleys

Verður nýtt uppskot grundarlag fyri lógarbroytinginum, sleppa eini 600 fólk inn aftur í skipanina. Tilsamans 2100 fólk fingu stuðul í farnu viku

Í løtuni verður arbeitt við at broyta Arbeiðsloysisskipanina. Óli Jacobsen, landsstýrismaður, sigur, at uppskotið væntandi verður lagt fyri tingið seinni í vikuni.

Uppskotið fevnir um, at útgjaldið verður hækkað til 70 pst., rullandi útgjaldið fellur burtur, og tíðin fólk kunnu vera í skipanini verður longd. Tað inniber, at eini 600 fólk, sum duttu úr skipanini 1. august í ár, sleppa inn aftur.

Sambært samgonguskjalinum skal ALS broytast, og 50 mió. krónur á fíggjarlógini er partur í broytingini. Umframt inngjaldið í ALS, so er 45 mió. króna lánið tøkt. Tað er lánið, sum stýrið fyri ALS ikki vildi taka í fjør. Lánið er tó framvegis til at taka, um á stendur at fíggja nýggja uppskotið, sigur Óli Jacobsen.

Oli Jacobsen sigur, at tað ikki verðir nærri ásett í lógini, hvussu leingi fólk skulu sleppa at vera í skipanini, men at uppskotið tó tryggjar øllum arbeiðsloysisstuðul árið út í 1995.

Í farnu viku fingu 2100 fólk stuðul í ALS. Verður uppskotið hjá landsstýrinum samtykt, fara eini 2700 fólk at fáa arbeiðsloysisstuðul.

Dagny